Útbjóðing

Skálafjarðarleiðin

SL fara við hesum alment at bjóða út rutusiglingina á Skálafjarðarleiðini. SL hava sum samferðslueind, vegna landið, til uppgávu at samskipa sjóvegis og landvegis samferðslu, herundir planleggja, stýra og hava eftirlit við rutusiglingini hjá landinum.

Útbjóðingin fevnir um
Øki Skálafjarðarleiðin
Leið 40. Strendur-Toftir-Tórshavn

Harafturat ynskja SL at samstarvað verður um flutning, sum er uttanfyri vanligu ferðaætlanina á Skálafjarðarleiðini, herundir eisini serflutning av ymiskum slagi.

Krøv
- Útbjóðingin skal virka fyri, at SL fær fíggjarligar og tænastuligar fyrimunir í rakstrinum
- Sáttmálaskeiðið skal ætlandi byrja 1. januar 2002
- Øll krøv og treytir verða annars ásett í útbjóðingartilfarinum.

Tilboð
Tilboð, merkt Útbjóðing Oyggjaleiðir, skulu vera innkomin til:

Strandfaraskip Landsins
att. Fólkaflutningsdeildin
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 29. oktober 2001, kl. 12:00.

SL skilar sær rætt til at velja ímillum innkomin tilboð ella ikki at taka við nøkrum av innkomnu tilboðunum. Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp. Sæð verður burtur frá tilboðum, sum ikki eru innkomin til tíðina.

Útbjóðingartilfar kann umbiðjast hjá SL, tlf. 343000 ella t-post: pjt@ssl.fo Áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út, skulu kr. 1.000,- latast í depositum.

Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðara.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

Starvsfólk til kundaavgreiðslu

Flogfelag Føroya søkir starvsfólk at arbeiða fulla tíð. Arbeiðið umfatar telefon- og kundaavgreiðslu á deildini hjá Flogfelag Føroya á Áarvegnum.

Vit vænta at tú hevur:
• royndir innan ferðavinnu
• royndir við AMADEUS bíleggingarskipan
• dugir væl danskt og enskt
• hevur áhuga fyri teldu
• ert ágrýtin og kundavinaligur

Til tíðir hava vit nógv at gera, og vænta at tú klárar arbeiðstrýst.

Heldur tú hetta vera nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn , ið verður viðgjørd í trúnaði, innan 25. september .
Starvið verður at seta sum skjótast.

Flogfelag Føroya
Boks 3225
Fo-100 Tórshavn

FLOGFELAG FØROYA

pétur á pétur • 320870

Hagstova Føroya

Vegna tess, at ein av okkara starvsfólkum er farið undir at útbúgva seg, og tí er givin í starvinum, søkja vit eftir nýggjum fólki.

Arbeiðsuppgávur
Tú fer fyrst og fremst at fáast við innlegging í ymsar hagtalsskipanir — eitt nú nýggja prístalið, kommunuroknskapir, virkisroknskapir o.a.. Men høvið verður eisini at vera við í arbeiðinum at viðlíkahalda og menna skipanirnar.

Førleikakrøv
Vit seta ikki serlig krøv til útbúgving, men dentur verður lagdur á kunnleika til teldu, evni at fara í holt við og skilja telduskipanir og arbeiðsroyndir við líknandi skipanum.

Setanartreytir
Tær eru sambært treytum í galdandi sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

Umsóknin skal vera á Hagstovuni í **seinasta lagi fríggjadagin 28.september 2001.** Hon skal sendast til

Hagstovu Føroya
Postox 2068
FO - 165 Argir.

Meira fæst at vita við at venda sær til stjóran á Hagstovuni á tlf. 35 28 00.

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2363, P/F Fjarhitafelagið, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Ronald Finbjørn Poulsen, Turidargøta 27, 100 Tórshavn (formaður), Daniel Peter Andreas Sundberg Olsen, Mikkjalstrøð 8, 100 Tórshavn og Páll Petersen, 180 Kaldbak.
Farin frá sum næstformaður: Kristian Fríðrik Olsen, á Brekku, 700 Klaksvík.
Innkomin sum formaður: Kristian Fríðrik Olsen, á Brekku, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Høgni Mikkelsen, Villingardalsvegur 34, 100 Tórshavn (næstformaður), Sjúrður Olsen, Viðargøta 11, 160 Argir og Leivur Hansen, Lýðarsvegur 21, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 13. september 2001

Kristin Balle

P/F ALMA Maskinverkstaður & Smiðja

Erlau kavaketur
Nú er tíð at kanna um maskinan er klár til kavarudding.

Erlau AG

Erlau AG umboðið í Føroyum

CAT MAK GROVE worldwide Hydrema Cyprus Munters epoke BUCHER

P/F ALMA
á Hjalla 15
P.O. Box 1338
FO-110 Tórshavn
Tel. 315 890
Fax 313 500
E-mail: alma@alma.fo
www.alma.fo

Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 5 ára gamlan drong, við Down Syndrom, í Eysturoy.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður í Kongshavnar Barnagarði í Saltangará og í heiminum, men tó í neyvum samstarvi við foreldrini, Almannastovuna og onnur fakfólk.

Arbeiðið fevnir um at hjálpa dronginum í samskiftinum við hini børnini í dagstovninum, at stimbra honum við venjingum og spæli og annars geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag, einsamøllum og saman við øðrum. Stuðulin fylgir dronginum í barnagarðin og skal eisini kunna fara við honum til fysioterapi o.a. uttan fyri stovnin.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Setunartíðin er 01.10.01.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Raghild Dahl á tlf. 314822 ella til Bettinu Christiansen á tlf. 448260 gerandisdagar millum 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og skulu sendast til:

Almannastovuna
Eysturoyar deild
att. Bettina Christiansen
Heiðavegur
600 Saltangará

Útleigan av fimleikarhøllini

Tey, sum ynskja at nýta fimleikarhøllina í Leirvíkar skúla í vetur, verða biðin um at boða frá á kommunuskrivstovuni tlf. 443006 í seinasta lagi hósdagin 20. september 2001.

Leirvíkar Kommuna
Boks 42
520 Leirvík

Starv

Stýrimaður/motorpassari

Hervið verður søkt eftir stýrimanni/motorpassara til Strandfaraskip Landsins, at seta skjótast gjørligt.
Viðkomandi skal byrja umborð á M/S "Rituni", men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins, sum fyriskipað av leiðsluni.
Viðkomandi skal kunna avloysa skiparan á Rituni.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

Uppgávurnar hjá skipunum
Høvuðsuppgávurnar hjá skipunum eru at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki runt oyggjarnar.
Umborð á Rituni eru knýttir ílalt 4 mans, og 3 mans sigla við hvørja ferð. Arbeiðstíðin er 56 tímar um vikuna og siglt verður í 3 vikur, síðani 1 vika avspáking.
Viðkomandi ið settur verður skal sigla 2 vikur sum stýrimaður og 1 viku sum motorpassari.
Dagliga farleiðin er Tórshavn-Nólsoy og ein túr um vikuna til Skúvoyar.
Umstøður eru ikki at búgva umborð.

Starvið fevnir um
Stýrimaðurin/motorpassarin skal vera við til at tryggja, at trygdarútgerðin umborð er í so góðum standi at øll, bæði manning og ferðafólk, kunnu kenna seg trygg, og annars at veita leiðsluni eina skilagóða rakstrarfyrisiting.
Stýrimaðurin/motorpassarin skal eisini verða við til at tryggja, at allar formligar reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdin er í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.
Aðrar høvuðsuppgávur eru m.a. at vera við til:
- Tryggja ein støðugan rakstur av skipinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir og ætlanir
- Hava eftirlit við maskinarínum
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

Førleikakrøv
- Vinnubrævur sum heimaskipari og motorpassari
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv ikki eldri enn 2 ár
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri enn 3 ár
- Prógv í GMDSS
- Roykkavari/sløkkileiðari ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleika og royndir viðvíkjandi rakstri av skipum (royndir sum yvirmaður)
- Kunnleika til lógarkrøv innanfyri rakstur av ferðamannskipum
- Góð samstarvsevnir og góðan røkjuskap

Setanartreytir
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 28. september 2001, kl. 12.00
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara
Tlf. 343000 ella e-mail: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutn-

SKALT TÚ MÁLA?

Sosialurin 311820

Eyðun Jacobsen
Málarameistari
Glyvrar
Tlf. 448355
Fartlf. 226504

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Sosialurin - 311820

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen

Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Bónus á Glyvrum
søkir eftir starvsfólki

Vit hava brúk fyri einum fólki at arbeiða fulla tíð



Umsókn við møguligum prógvi og viðmælum skulu sendast til Bónus skjótast gjørligt

Bónus á Glyvrum
625 Glyvrar